# Nýggi Smyril 33 milliónir bíligari

**Nýggi Smyril er nú endaliga yvirtikin á føroyskar hendur. Prísurin á Smyrli er lækkaður úr 301 milliónum niður í 268 milliónir**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyingar hava nú endaliga yvirtikið nýggja Smyril.

Allir sáttmálar og allar avtalur um skipið vóru undirskrivaðar hósmorgunin og aftaná slapp stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen, at vinda føroyska flaggið í húnarhátt á hekkuni á nýggja Smyrli.

Tað, sum liggur í kortunum í løtuni, er, at Smyril loysir frá bryggju í Spania týsdagin 11. oktober og kemur inn á Tvøroyri leygardagin 15. oktober.

Á Tvøroyri verður so stór móttøka fyri skipinum.

Sunnudagin er ætlanin at sigla til Havnar og har verður hann so eisini vístur fram fyri almenninginum.

Tað fer at taka umleið eina viku frá tí at hann kemur, til hann kann setast í regluliga sigling, tí manningin skal hava ymsar venjingar áðrenn

Samstundis sum Smyril er yvirtikin, er sjálvandi eisini endalig avtalað gjørd um, hvussu nógv nýggi hann skal kosta.

Upprunaliga skuldi Smyril kosta 301 millión, men hendan upphæddin er nú regulerað við teimum endurgjøldum, sum Skipasmiðjan skal betala av tí skipið er seinkað eitt heilt ár, siga Strandferðslan og Innlendismálarráðið í tíðindaskrivi.

Í hesum sambandi er samlaði kostnaðurin fyri skipið lækkaður úr 301 milliónum krónum, niður í 268 milliónir krónur.

Sostatt endaði tað við, at skipasmiðjan koma at betala 33 milliónir í endurgjaldi fyri at skipið er so nógv seinkað.

– Endurgjaldið skal gera fulnað fyri missin og tann meirkostnað, sum Strandferðslan – og Føroyar sum heild – hava havt av, at byggitíðin er nógv longd, siga Strandferðslan og innlendismálaráðið.

– Meirkostnaðurin stavar serstakliga frá øktum og longdum byggieftirliti, fyri alla tíðina at tryggja neyðugu góðskuna av skipinum. Hetta eftirlit hevur kostað 10 milliónir krónur meiri enn upprunaliga ætlað. Harumframt skal endurgjaldið gera fulnað fyri væntaða virðisminking á Smyrli 1, og at føroyingar hava verið noyddir at bíða eitt ár eyka til at fáa eitt munandi betri ferðasamband til Suðuroyar.



*Hósdagin vant Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, Merkið í húnarhátt á hekkuni á Smyrli og hann er nú endaliga yvirtikin á føroyskar hendur*



## Vit søkja forritara

Vegna økt virksemi, bæði í Føroyum og uttanlands, verður søkt eftir royndum forritara til okkara menningardeild.

Arbeiðið á deildini er fjølbroytt og fevnir um allar tættir innan menning og forriting av eginloysnum.

Talan er um eitt starv, har tú fært høvi at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur hollar royndar innan OOP. Fyrimunur er um tú hevur førleika innan fylgjandi økir:

- Delphi
- C++
- C#
- SQL dátugrunnar
- Microsoft stýriskipanir yvirhøvur

Tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti og at loysa uppgávur sjálvstøðugt, men hevur eisini evnir til at gerast ein virkin og góður samstarvsfelagi sum partur í verkætlanum.

**Starvstreytir**
Løn og onnur starvsviðurskifti verða avtalað í tráð við royndir og førleika.

**Umsókn**
Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til Edvard S. Remberg á telefon 344075. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til esr@formula.fo ella við brævi til

Formula.fo
Stiðjagøta 5
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. oktober 2005.

Formula.fo

Formula.fo er Føroya størsta privata KT fyritøka við yvir 60 fólkum í starvi. Eitt av virkisøkjunum er menning av loysnum bygdar á fyrst og fremst Microsoft tøkni.

www.sansir.fo

P/F Formula.fo, Stiðjagøta 5-11, Postrúm 1078, 110 Tórshavn, Tel 344000, Fax 344001, www.formula.fo

formula.fo

## Nýggi Mazda 5

Prísir úr kr. 227.000,-



mazda

Bilasølan
Vegurin langi, 315354
www.bilasolan.fo

Vit hava opið leygardag

www.mazda.dk

Trý ára Total Garanti 3 í mesta lagi 100.000 Kilometer